# Minningarorð Signar Vilhelmsen

**13.11.1971-13.05.2007**



Eingin veit á morgni at siga, hvar ein á kvøldi gistur. Hettar gamla orðatakið fingu vit so dyggiliga staðfest, tá okkara góði vinur og starvsfelagi Signar Vilhelmsen andaðist sunnumorgunin 13. mai, einans 35 ára gamal.

Tað er við stórari sorg og sakni, eg royni at skriva nøkur minningarorð um vinmannin Signar, sum sigldi við okkum øll árini síðan Vesturtúgvan bleiv keypt til Sandavágs.

Signar kom at sigla við okkum fyri góðum sjey árum síðani, hann varð tá forlovaður við einari fittari sørvágsgentu, sum nakað seinni bleiv hansara kona. Signar var ein sera fittur og siðiligur maður, altíð klárur tá nakað arbeiði skuldi gerast, við einum jaligum lyndi, sum stimbraði alt mannskapið í teirra arbeiði.

At Signar so brádliga bleiv tikin burtur kom púra óvart á okkum allar, og ikki minst á Signar sjálvan. Sótu síðsta túrin og tosaðu og flentu at soninum Allan Paula, hvussu fittur og smílandi hann er, og hvussu hann gleddi seg til at fara til Florida við sínari konu, sum hann ikki smæddist at vísa, hvussu høgt hann elskaði.

Nú eg siti umborð aftur henda fyrsta túrin aftan á jarðarferðina og sakni Signar ímillum okkum, leiti eg mær styrki hjá Harranum, tí at skilja hetta er mær ov torført, men eg veit, at Harrin ongantíð tekur feil, og at Harrin fer at geva tykkum styrki í hesum tungu døgum.

Inga Poulsen Dam, prestur, segði nakað soleiðis í kirkjuni, at tað var ikki tað týdningarmesta hvussu nógv ár man livdi, men hvussu man livdi tey ár, man fekk tillutað og har trúgvi eg, at øll, sum kendu Signar, eru samd í, at tað dugdi Signar til fulnar.

Eg byrjaðu við at skriva at eingin veit á morgni at siga, hvar ein á kvøldi gistur, hetta er so satt sum tað er sagt.

Góða Lív og Allan Pauli, orð eru so fátæk tá ein so brádliga verður skildur frá tí man elskar, tá er gott at eiga so nógv góð og vøkur minnir, sum vit eiga um Signar.

Má Gud signa og styrkja tykkum øll, konu, son, foreldur, systkin og svigarforeldur í tykkara stóru sorg.

**Heilsan manning og reiðarí á Vesturtúgvu**

†

## Andlát og jarðarferðir

**Rasmus Johannesen**, ættaður úr Mykinesi, búsitandi í Havn, andaðist á Ríkissjúkrahúsinum týsdagin 19. juni, 82 ára gamal. Bønarhald verður í Vesturkirkjuni fríggjakvøldið klokkan 18. Jarðarferðin verður úr Vesturkirkjuni leygardagin klokkan 13. Tey, ið ynskja at minnast Rasmus, kunnu lata eina peningagávu til Vesturkirkjuna. Kontur í peningastovnunum.

**Regin Dahl** andaðist í Keypmannahavn tann 29. mars 2007. Urnan verður jarðsett í kirkjugarðinum í Havn. Við tað høvið verður hátíðarløta í Havnar Kirkju fríggjadagin klokkan 16.

**Dagurin**

**23. juni. Paulinus**, deyður ár 431. Franskur munkur, sum gjørdist biskupur í Nola í Italiu, har hann doyði úti við 80 ára gamal

**24. juni. Jóansøka**. Føðingardagur Jóhannes Doyparans. Minningardagurin hjá halgimennum var vanliga deyðadagur teirra, men hjá Johannes Doyparanum er tað føðingardagurin, ið verður hildin, av tí at hann var heilagur longu í móðurlívi.

**25. juni. Prosper.** Halgimenni úr Fraklandi, sum teir annars vita lítið um at siga uttan tað, at hann var høgt mettur kirkjulærari í fornkirkjuni og doyði í 455. Navnið merkir hin eydnuríki.

Lesið Sosialin - so eru tit við

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá okkara kæra kona, mamma, vermóðir og omma

**Anna Vágsheyg Lützen**

andaðist og varð jarðað.
Ein serstøk tøkk til tykkum, sum hjálptu til uppá ymiskan hátt.
Takk fyri heilsanir, blómur og kransar.
Takk til tykkum, sum fylgdu Annu til hennara seinasta hvíldarstað.

*Vinarliga*

**Mads, Christoffer, Jógvan, Alvilda og Oddvør**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum á ein ella annan hátt sýndu samkenslu, tá elskaða kona, mamma, vermamma, omma og systir okkara

**Hjørdis í Jansagerði**

andaðist og fór til gravar.
Tøkk til familju og vinir, ið hjálptu til í samband við jarðaferðina og ervinum. Tøkk til Ingu Dam Poulsen prest, kirkjutænarar, sangarar og gravarar. Tøkk fyri heilsanir, uppringingar, blómur, kransar og peningagávur til Miðvágs kirkju. Tøkk til tykkum øll, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Erik, Anna Maria, Peter, Ole og Dorte**

## Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, ið sýndu samkenslu, tá ið elskaði maður mín, pápi, verfaðir, abbi, langabbi og bróðir okkara

**Ernst Hansen**
Toftir

doyði og varð jarðaður.
Takk fyri forbøn og umsorgan tey trý árini, hann var sjúkur. Takk fyri alla hjálp í sambandi við bønarhaldið, jarðarferðina og erviðið. Og takk tit mongu, sum fylgdu honum til hansara síðsta hvíldarstað her á fold. Takk fyri heilsanir, blómur og gávur til missiónshúsið. Guð signi tykkum øll.

*Vegna familjuna*

**Kate**

**Marita, Tummas, Krista, Eyðun og Kaj Eli**

*Í tí landi ei tár skulu renna,*
*eingin pína og sjúka skal níva,*
*har ei særandi sorg er at kenna,*
*– um eitt bil, ja, so eri eg har.*
*Ei skal gleðinnar dagur har halla,*
*ei skal ivin tá tyngja mítt sinni,*
*aldri meira vit snáva og falla,*
*tí tá eru vit heima, o, Gud!*

**75 ár**

Í dag 22. juni fyllir Jutta Lognberg, Skopun 75 ár. Hon er burturstødd.

**Brúdleyp**

23. juni giftast í Elmelunde Kirke á Møn, Pól Martin Hansen, ættaður úr Kollafirði og Charlotte Bendix Cahl ættað úr Ishøj, búsitandi í Kongedybet 21, 5. sal, 2300 København S. Veitsla verður fyri innbodnum á Elmehøj, Møn.

23. juni giftast í Varde Rådhus, Annika Knudsen ættað av Glyvrum og Anders Sund Trads, Esbjerg. Brúdleypsadr. Hovedgaden 10, Næsbjerg, 6800 Varde.

Leygardagin 23. juni 2007 giftast Lissy Durhuus úr Vestmanna og Stephen Ryan úr Dublin. Vígslan verður í Vestmanna Kirkju kl. 16.00. Veitslan verður fyri innbodnum á Hotel Føroyum.